# Kórkonsert í Fuglafirði



Sunnudagin 16. desember klokkan 17 verður kórkonsert í Fuglafirði. Talan verður um blandað kór, har blásarar, floyta, orgul og klaver eisini spæla við. Kórleiðari verður Frits Johannesen, og hann hevur fleiri góð fólk afturat sær. Heðin Kambsdal verður á orgul. Rói Eliasen og Eyðun á Lakjuni hava klaverfylgispæl. Á floytu verður Morid Simonsen, meðan Rúni Hentze, Kjell Orseth og Sandy í Lambanum og Eliseus Johannesen hava blásiinstrumentini um hendi.




















